# Næraberg kemur nú aftur úr Noregi

**Í Noregi eru ábøtur framdar á skipið, og betringar eru eisini gjørdar á verksmiðjuni, soleiðis at surimi-framleiðslan kann gerast uppaftur betur til dygdar. - Endamálið er at fáa ein betri prís fyri vøruna, sum er ógvuliga avgerandi fyri raksturin, sigur Hanus Hansen, stjóri á JFK-Troli í Klaksvík**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Tað eru bara tvey skip í øllum heiminum, sum gera surimi burtur úr svartkjafti. – Hetta hevur verið eitt kostnaðarmikið projekt, men við góðum vilja úr Noregi eru vit komin har til, sum vit eru, sigur stjórin á JFK-Troli, Hanus Hansen*

Tá ið Næraberg fór úr Føroyum til Noregs, varð ivi reistur um, hvørt skipið, sum hevur verið ein partur av okkara fiskiflota seinastu fýra árini, mundi fara at koma higar til lands aftur.

Men nú er eingin ivi longur um hetta, tí ein av komandi døgunum stevnir risatrolarin aftur úr Noregi til Føroya.

Hanus Hansen, stjóri á JFK-Troli, sigur, at Næraberg fer at halda fram við somu vinnu sum higartil.

-– Dentur verður lagdur á surimi-framleiðslu úr svartkjafti, umframt at skipið eisini plagar at hava nakað av mjøli, farsi og butterflyfløkum.



*- Tað er avgerandi fyri raksturin av Nærabergi, hvussu prísirnir á surimi úr svartkjafti verða. Tí verður nú roynt at gera vøruna uppaftur betur, sigur Hanus Hansen, stjóri*

### Betri vøra

Stjórin á JFK-Troli sigur, at í Noregi eru ábøtur framdar á skipið, umframt at betringar eru gjørdar á verksmiðjuni, soleiðis at dygdin á surimi-vøruni kann gerast betur.

– Seinast, tá ið broytingar vórðu gjørdar á verksmiðjuni, var tað í fyrsta lagi við tí fyri eyga at fáa meira burtur úr hvørjum kilo av fiski. Hesaferð verður so roynt at gera vøruna uppaftur reinari og betri, soleiðis at betri prísur kann fáast fyri hana.

Hanus Hansen sigur, at prísirnir á surimi úr svartkjafti hava verið alt ov lágir, men eru nú uppeftir gangandi.

– Vit vóna, at betringarnar av framleiðsluni og prísrákið annars fara at gera, at vit fáa meira fyri surimivøruna.

Hann sigur, at størstu marknaðarlondini í løtuni eru Japan og Frakland, men eisini onnur lond, eitt nú Spania og eystursjóvarlondini, eru í ein ávísan mun farin at keypa surimi úr svartkjafti.

### Long leið

Tað eru bara tvey skip í øllum heiminum, sum gera surimi burtur úr svartkjafti. Tað eru Næraberg og ein franskur trolari.

Í Suðurameriku eru eisini nøkur skip, sum gera surimi úr fiski, ið minnir um svartkjaft, og eisini her hevur kendi norski ríkmaðurin, Kjeld-Inge Røkke, sum er maðurin aftanfyri Næraberg, nøkur áhugamál.

Hanus Hansen er fegin um, at norðmenn hava sýnt projektinum við Nærabergi so stóran áhuga, hóast raksturin hesi árini hevur givið hall.

– Hetta hevur verið eitt kostnaðarmikið projekt, men við góðum vilja úr Noregi eru vit komin har til, sum vit eru.

Hann vísir á, at nøgdirnar av surimi eru stórar, og tí kann ein bati í prísinum gera, at raksturin verður meira lønandi enn higartil.

– Tað er avgerandi fyri okkum, hvussu prísirnir á surimi úr svartkjafti verða. Tí verður nú roynt at gera vøruna uppaftur betur, og vit vóna, at hetta fer at síggjast aftur í prísinum og rakstrinum av skipinum, sigur stjórin á JFK-Troli, Hanus Hansen.

---

Línuskipini:

# Ein glotti undir Íslandi

**- Vantandi toskafiskiskapur, bíligur upsi, dýrari agn og olja tyngja nógv um hjá ísfiskaflotanum í løtuni, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Jákup Sólstein**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Jákup Sólstein, formaður í Føroya Reiðarafelag. – Ísfiskaflotin er í tungum sjógvi í løtuni, men onkrir glottar eru fyri framman*

Væntandi er ikki, at hetta árið fer at roynast nakað serligt hjá ísfiskaflotanum.

Formaðurin í Reiðarafelagnum, Jákup Sólstein, vísir á, at trupulleikin hjá partrolarum og lemmatrolarum í fyrsta lagi er, at prísurin á upsa framvegis er sera lágur, samstundis sum oljuútreiðslurnar í hesum árinum eru nógv øktar.

– Bara í hesum árinum eru prísirnir á olju til skipini øktir við 50%, og hetta tyngir ógvuliga nógv um raksturin hjá partrolarunum og lemmatrolarunum. Haraftrat kemur, at upsaprísurin, sum leingi hevur verið ógvuliga lágur, lítið og einki er øktur.

Jákup vísir á, at tað, sum hóast alt hevur gjørt, at trolaraflotin hórar, er, at nøgdirnar av upsa leingi hava verið so stórar.

– Fiskurin hevur verið ógvuliga smáfallandi, men á ávísum leiðum er upsin nú heldur frægari, eitt nú á leiðunum rundan um Føroyabanka. Tað er bara spell, at meira ikki fæst fyri hendan fiskin, heldur hann.

### Línuskipini

Formaðurin í Reiðarafelagnum sigur, at raksturin hjá línubátunum heldur ikki er hin sami, sum fyri bert einum ári síðan.

– Sum eg havi skilt, royndist fyrri helmingur av árinum á eini leið, men í summar og í heyst hevur lítið verið at fingið hjá línuskipunum. Fleiri skip rokaðust um hesa tíðina í fjør, og eitt nú fingu tey nógvan tosk á Føroyabanka. Men nú er lítil og eingin toskur at fáa nakrastaðni, heldur ikki á Føroyabanka.

Jákup vísir á, at øktu oljuútreiðslurnar eisini raka línuskipini, umframt at agnið er vorðið nógv dýrari.

Her vísir hann á, at prísirnir á høgguslokki eru øktir úr 10 krónum fyri kilo í ár upp í 16 krónur fyri kilo.

– Í løtuni eru fleiri línuskip undir Íslandi, har vit eiga eina samlaða kvotu upp á 5.600 tons. Ein vanlig kvota hjá einum línubáti er 218 tons, harav í mesta lagi 25% av veiðini kann vera toskur.

Jákup Sólstein sigur, at hann um dagarnar hevur skilt, at línuskipini hava hampiliga góðan fiskiskap undir Íslandi, og hann hevur eisini skilt, at okkurt av skipunum hevur fingið upp í kassarnar.

– Heystið og tíðin fram til ársskiftið plagar at roynast hampiliga væl hjá línuskipunum undir Føroyum. So, vit kunnu vóna, at túrarnir undir Íslandi og bøttur fiskiskapur undir Føroyum tað, ið eftir er av árinum, fer at gera, at árið 2004 ikki verður so galið hjá línuflotanum hóast alt, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum at enda.



# Javnaðarflokkurin úr dvalanum

**– Javnaðarflokkurin er eftir mínum tykki við at stabilisera seg aftur eftir fleiri tung ár. Jóannes Eidesgaard ger ein góðan figur sum løgmaður, og hann tykist eisini hava góða undirtøku millum fólkið. Javnaðarflokkurin var ikki serliga konstruktivur andstøðuflokkur, og nýggi leikluturin sum samgonguflokkurin hevur givið flokkinum nýggjan íblástur, heldur samfelagsfrøðingurin, Jóanes N. Dalsgaard**

VELJARAKANNING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*– Stuttligi flokkurin hevði ein sterkan sosialan profil, og tað kann hugsast, at fleiri av veljarunum hjá Stuttliga flokkinum hava leitað sær aftur til Javnaðarflokkinum, vísir samfelagsfrøðingurin Jóanes N. Dalsgaard á*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Atkvøður frá Stuttliga flokkinum. Samgongurfriður. Ein vælumtókur løgmaður.

Hetta er uppskriftin hjá Javnaðarflokkinum til at gerast best umtókti flokkur í Føroyum í løtuni.

Fríggjadagin almannakunngjørdi Útvarp Føroya feskastu veljarakanningina. Sosialurin hevur fingið samfelagsfrøðingin, Jóanes N. Dalsgaard, at gera viðmerkingar til kanningina.

– Framgongdin hjá bæði Javnaðarflokkinum og Tjóðveldisflokkinum vísir avgjørt eitt rák. Hjá hinum flokkunum er sveiggið so lítið, at tað er ógjørligt at gera nakra niðurstøðu um gongdina hjá hesum flokkum, tí óvissan er so mikið stór, sigur Jóanes N. Dalsgaard.

Hann vísir á, at vanliga verður mett, at veljarakanningar hava eina óvissu á hálvt triðja prosent báðar vegir, og tíheldur hann seg aftur at gera viðmerkingar um gongdina hjá øðrum flokkum enn Tjóðveldisflokkinum og Javnaðarflokkinum.

### Friður

Samfelagsfrøðingurin duggir ikki at nevna nakra høvuðsorsøk til, hví Javnaðarflokkurin gongur fram við 3 % sammett við løgtingsvalið í januar mánað.

– Stríðið sum eyðkendi farnu samgongu er burtur, og friðurin, sum tykist at valda í sitandi samgongu kann vera ein orsøk til framgongdina. Samgongan hevur verið eitt sindur óheppin í málinum um lítla Petur og útlendingarnar, men tað tykist ikki sum málini hava elvt til stríð innanhýsis í samgonguni, heldur Jóanes N. Dalsgaard.

Málið um lítla Petur hevur fingið stóra rúmd í fjølmiðlunum í vár og í summar, men sambært veljarakanningini verða Javnaðarflokkurin og Hans Pauli Strøm ikki revsaðir fyri handfaringina av málinum.

– Tað er møguligt, at fólk hava sitið eftir við kensluni, at málið um lítla Petur varð rættiliga einvíst framstillað. Í fjølmiðlunum hava nógvar gitingar og illgitingar verið, og tá alt kom til alt vóru onnur ting, sum gjørdu seg galdandi í málinum, heldur samfelagsfrøðingurin

### Úr Stuttliga flokkinum

Sambært veljarakanningini gongur Javnaðarflokkurin úr 21, 8% á løgtingvalinum 20. januar til 24,8% í veljarakanningini hjá Gallup. Spurdur úr hvørjum flokkum nýggju veljarar hjá Javnaðarflokkinum koma, svarar Jóanes N. Dalsgaard, at tað kann væl hugsast, at fleiri teirra koma úr Stuttliga flokkinum hjá Jóhan í Kollafirði.

– Stuttligi flokkurin hevði ein sterkan sosialan profil, og tað kann hugsast, at fleiri av veljarunum hjá Stuttliga flokkinum hava leitað sær aftur til Javnaðarflokkinum, vísir samfelagsfrøðingurin á.

### Komin seg

Jóanes N. Dalsgaard heldur, at Javnaðarflokkurin er við at koma seg aftur eftir, at flokkurin ikki hevur gjørt so nógv um seg í fleiri ár

– Javnaðarflokkurin er eftir mínum tykki við at stabilisera seg aftur eftir fleiri tung ár. Jóannes Eidesgaard ger ein góðan figur sum løgmaður, og hann tykist eisini hava góða undirtøku millum fólkið. Javnaðarflokkurin var ikki serliga konstruktivur andstøðuflokkur, og nýggi leikluturin sum samgonguflokkurin hevur givið flokkinum nýggjan íblástur, vísir Jóanes N. Dalsgaard.







## Frálíkt andstøðuarbeiði

**Hegni at profilera seg um ein virkin andstøðuflokkur og ein sambandssinnað samgonga er høvuðsorsøkin til, at Tjóðveldisflokkurin hevur so stóra framgongd, heldur Jóanes N. Dalsgaard**

VELJARAKANNING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Teir hava dugað ótrúliga væl at profilera seg hetta valskeiðið. Tjóðveldisflokkurin er skjótur at úttala seg í einstøku málunum, og flokkurin hevur eftir mínum tykki skipað seg væl við framsøgufólki í hvørjum máli sær.

Samfelagsfrøðingurin, Jóanes N. Dalsgaard, er sannførdur um, at fremsta orsøkin til, at Tjóðveldisflokkurin stendur seg so væl í veljarakanningini, er virkna andstøðuarbeiðið hjá flokkinum.

– Tað hevur verið væl meir góðs í andstøðuni í hesum valskeiðnum enn undanfarin valskeið. Skal eg arga hinar flokkarnar eitt sindur, ber til at siga, at veljarakanningin vísir, at arbeiðir tú seriøst, fært tú nakað burturúr, sigur Jóanes N. Dalsgaard

### Verri við fullveldinum

Í veljarakanningini fer Tjóðveldisflokkurin úr 21, 7% á løgtingsvalinum til 24,8 %. Umframt at vera ein virkin andstøðuflokkur metir Jóanes N. Dalsgaard, at minkandi fokus á sjálvstýrismálið hjá sitandi samgongur kann vera ein orsøk til framgongdina hjá Tjóðveldisflokkinum.

– Tað kann hugsast, at fullveldisvongurin mobiliserar seg ímóti sambandsamgonguni, tí sjálvsstýrismálið fyllir ikki nógv hjá sitandi samgongu. Møguliga halda fólk, at støðan í sjálvstýrismálinum í løtuni er hættislig, heldur Jóanes N. Dalsgaard.